HEILSUMÁLARÁÐIÐ

# Sáttmáli

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 354045 • E-mail: ahr@ahr.fo

# Sáttmáli

Hesin sáttmálin, sum er gjørdur millum Heilsumálaráðið og Kommunulæknafelag Føroya, er galdandi fyri øll kommunulæknastørv í Føroyum.

**Læknatænasta**

**§ 1.** Kommunulæknin hevur skyldu til at røkja alt vanligt praksisarbeiði í sínum læknadømi, sambært sáttmála millum Kommunulæknafelag Føroya og Meginfelag Sjúkrakassa Føroya.
*Stk 2.* Kommunulæknin hevur skyldu til at røkja vaktir í eini vaktarskipan, og fyri hetta fær hann samsýning, sambært sáttmálanum millum Kommunulæknafelag Føroya og Meginfelag Sjúkrakassa Føroya.
*Stk. 3.* Kommunulæknin kann veita aðra læknatænastu, sum tað almenna fyriskipar við lóg og/ella reglugerð. Fyri hvørja almenna uppgávu sær, skal avtala gerast millum Kommunulæknafelag Føroya og avvarðandi stovn um arbeiði og samsýningina fyri hetta.
*Stk. 4.* Kommunulæknin hevur møguleika at býta sítt kommunulæknastarv við ein annan lækna, eftir samráðingum millum Kommunulæknafelag Føroya og Heilsumálaráðið. Fyri hvørt einstakt starvsbýti, skulu greiðar reglur gerast um hetta í starvslýsingini hjá báðum læknunum.

**§ 2.** Læknin skal vera tøkur, tá hann hevur vakt sambært sáttmálanum millum Kommunulæknafelag Føroya og Meginfelag Sjúkrakassa Føroya.
*Stk. 2.* Læknin hevur skyldu til at kunna sjúklingarnar, um so er, at hann verður burturstaddur í vanligu arbeiðstíðini. Somuleiðis skal boðast frá, hvør ið tekur sær av arbeiði hansara í hesum tíðarskeiði.

**Setan og uppsøgn av kommunulækna**

**§ 3.** Tá eitt kommunulæknastarv skal setast, skal hetta lýsast leyst í minst einum norðurlendskum læknatíðarriti, sum Kommunulæknafelag Føroya hevur góðkent. Umsóknarfreistin skal vera minst 14 dagar frá tí at lýst verður.
*Stk. 2.* Fyri hvørt læknadømi sær skal vera ein serlig starvslýsing, sum Kommunulæknafelag Føroya hevur góðkent.
*Stk. 3.* Setanarbræv, sum vísir til henda sáttmálan, verður undirskrivað av kommunulæknanum og landsstýrismanninum í heilsumálum. Partarnir fáa hvør sítt eintak av setanarbrævinum.
*Stk. 4.* Kommunulæknin kann siga seg úr starvi við 3 mánaða freist.
*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin í heilsumálum kann við haldgóðari grundgeving siga kommunulæknan úr starvi samsvarandi teimum freistum, sum eru ásettar í § 2, stk. 2 í lóg um starvsmenn. Áðrenn landsstýrismaðurin tekur avgerð um at siga ein kommunulækna úr starvi, skal hann leggja uppsøgnina fyri Kommunulæknafelag Føroya og kommunulæknan til ummælis. Ummælisfreistin er 14 dagar.

**Sjúka, forfall, barnsburðarfarloyvi og frítíð**

**§ 4.** Er kommunulæknin sjúkur ella hevur annað lógligt forfall í upp til 14 dagar, røkja grannalæknarnir hansara arbeiði eftir sáttmálanum millum Kommunulæknafelag Føroya og Meginfelag Sjúkrakassa Føroya. Verður fráveran longri, setir landsstýrismaðurin í heilsumálum ein avloysara fyri kommunulæknan.
*Stk. 2.* Við fráveru, sum nevnt undir stk. 1 ella vegna barnsburð, hevur kommunulæknin rætt til grundupphæddina sambært § 5.
*Stk. 3.* Læknin hevur rætt til frítíð eftir frítíðarlógini, uttan at hann hevur skyldu til at seta ein frítíðaravloysara í hesum tíðarskeiði. Tó hevur hann skyldu til, innan fráferð at seta ein

møguligan frítíðaravloysara inn í arbeiðsviðurskiftini. Um neyðugt setir læknin eitt hjálparfólk í starv til frítíðaravloysaran, og verður hetta lønt av Heilsumálaráðnum.
*Stk. 4.* Um ov fáir umsøkjarar eru til størvini sum frítíðaravloysari, tilskilar Heilsumálaráðið sær rætt til at raðfesta tey økini hægri, har fáir læknar eru, tá hesi størvini skulu setast.

### Gjald til kommunulæknar í føstum starvi

**§ 5.** Landskassin rindar eina grundupphædd til hvønn kommunulækna eftir avtalu millum Kommunulæknafelag Føroya og Heilsumálaráðið. Grundupphæddin er pr. 1. oktober 2007, kr. 14.564,71 um mánaðin. 1. januar 2009 hækkar grundupphæddin við 1.800,00 kr. um mánaðin. Grundupphæddin verður regulerað samsvarandi lønum hjá tænastumonnum landsins. Fyri tíðarskeiðið 2007 – 2009 er hækkingin 3 % um árið, hvønn 1. oktober.
*Stk. 2.* Grundupphæddin kann vera ymisk frá læknadømi til læknadømi, støddin á henni skal avtalast millum Kommunulæknafelag Føroya og Heilsumálaráðið, og skal verða góðkend av Fíggjarmálaráðnum í hvørjum einstøkum føri.
*Stk. 3.* Er eitt kommunulæknastarv ósett, ella verður hetta starv ikki røkt vegna fráveru, sum nevnt í §§ 4 og 9, verður fasta grundupphæddin fyri viðkomandi starv latin til tann ella teir kommunulæknar, sum avtala er gjørd við um at røkja hetta starvið.

### Gjald til avloysarar

**§ 6.** Grundupphæddin til avloysarar í leysum størvum, fellur burtur frá 1. november 2008. Avloysarar í leysum størvum verða tryggjaðir eina minstuupphædd, tá øll gjøld eru íroknað. Uppgerð verður gjørd fyri alt avloysaraskeiðið. Fyri tíðarskeið 3 mánaðar og styttri er upphæddin 20.000,00 kr. um vikuna. Fyri tíðarskeið longri enn 3 mánaðar, er upphæddin 15.000,00 kr. um vikuna.
*Stk. 2.* Heilsumálaráðið rindar fyri hjálparfólk hjá avloysarum í leysum størvum.

### Eftirløn

**§ 7.** Kommunulæknar í føstum starvi fáa eftirløn av grundupphæddini. Frá 1. juli 2008 er eftirlønin 5%. Frá 1. oktober 2009 hækkar eftirlønin úr 5% upp í 8%. Frá 1. oktober 2010 hækkar eftirlønin úr 8% upp í 10%. Eftirlønin verður flutt í góðkenda eftirlønarskipan, t.d. Lægernes Pensionskasse ella Føroya Lívstrygging.

### Seniorskipan

**§ 8.** Útgoldið verður eitt bonusgjald til kommunulæknar í føstum starvi, sum fara úr starvi við fyltum 67 ára aldri ella fyltum 70 ára aldri. Kravt er tó, at kommunulæknin hevur verið í føstum starvi í kommunulæknaskipanini í minsta lagi 10 ár, herav 4 ár samanhangandi, áðrenn viðkomandi fer úr starvi. Bonusgjald við fyltum 67 ár er ½ ára grundgjald. Bonusgjald við fyltum 70 ár er 1 ára grundgjald. Bonusgjald verður bert útgoldið hvørjum einstøkum kommunulækna einaferð.
*Stk. 2.* Kommunulæknar 55 ár og eldri í føstum starvi, hava møguleika fyri at fáa 2 frívikur um árið við 10.000,00 kr. um vikuna í seniorviðbót, umframt grundupphædd, galdandi frá 1. januar 2009. Í 2008 kunnu kommunulæknar taka 1 fríviku. Ikki nýttar frívikur í einum kalendaraári fella burtur.

### Eftirútbúgving/farloyvi

**§ 9.** Heilsumálaráðið viðurkennir tørvin hjá kommunulæknum at luttaka í viðkomandi eftirútbúgvingarskeiðum, sum Kommunulæknafelag Føroya hevur góðkent.
*Stk. 2.* Heilsumálaráðið rindar skeiðsgjald, ferðaútreiðslur og vistaruppihald hjá kommunulæknum, sum eru í føstum starvi. Henda upphæddin er í mesta lagi 15.000 kr. um

árið galdandi frá 1. januar 2009. Upphæddin verður roknað sum grundgjald, og verður regulerað við somu prosentum sum sjúkrakassagjøldini.
*Stk. 3.* Kommunulæknar hava møguleika fyri at savna saman veitingarnar eftir § 9, stk.2 í 2 ár, men fellur tó upphæddin frá fyrra árinum burtur við árslok annað árið. Heilsumálaráðið tilskilar sær rætt til at seta mark fyri, hvussu nógvir kommunulæknar kunnu fara á skeið í einum ári, til tess at tryggja at samlaði fíggjarkarmurin verður hildin.
*Stk. 4.* Kommunulæknar hava rætt til farloyvi uttan samsýning, tá hetta ikki nervar kommunulæknaskipanina annars. Farloyvið kann játtast í upp til eitt ár. Heilsumálaráðið hevur ábyrgd av at hava starvið leyst til læknan, tá farloyvið er úti. Eftir 5 ára samanhangandi starvstíð, hevur kommunulækni rætt til farloyvi í 3 mánaðar uttan at missa grundarupphæddina. Hetta er treytað av, at farloyvið verður nýtt til at økja um fakliga førleikan ella til at gera vísindaligar kanningar innan almenna læknafrøði. Læknin hevur í hesum sambandi ikki skyldu til at seta nakran avloysara. Tó hevur hann skyldu til innan fráferð at seta ein møguligan avloysara inn í arbeiðsviðurskiftini. Hesin rættur til farloyvi við løn kann ikki samlast upp til longri farloyvisskeið, um møguleikin ikki er nýttur innan fyri eitt 5 ára skeið.

**Trætumál**

**§ 10.** Trætumál viðvíkjandi hesum sáttmála skulu leggjast fyri gerðarrætt, sum er mannaður við einum umboði fyri Kommunulæknafelag Føroya og einum umboði fyri Heilsumálaráðið. Báðir partar velja í felag ein uttanveltaðan triðja persón, sum helst skal vera løgfrøðingur. Kunnu partarnir ikki semjast um triðja persónin, velur sorinskrivarin hendan.

**Gildi**

**§ 11.** Hesin sáttmálin millum Heilsumálaráðið og Kommunulæknafelag Føroya er gjørdur í tveimum eintøkum. Sáttmálin kemur í gildi 1. juli 2008 og verður galdandi í 3 ár frá gildiskomu, t.v.s. til 30. juni 2011. Báðir partar kunnu siga sáttmálan upp við 3 mánaðar freist, tó í fyrsta lagi at fara úr gildi 1. juli 2011.

Tórshavn, tann 27/10-2008

| Kommunulæknafelag Føroya | Heilsumálaráðið |
|---|---|
| Jaspur Petersen, formaður | Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður |
| | Poul Geert Hansen, aðalstjóri |